

*Hetta var eitt konsertupplivilsi av teimum stóru. Men stórt er neyðturviliga ikki tað sama sum gott – einum nýtist ikki at uppliva tað sum gott ella minniligt.*

# Poppdrotningin í tí miðjútska

**Tað er hóskvøld og vit, 85.000 spentar poppsálir, standa á miðjútskum fløtum í Horsens - Poppheimsins miðstaður í eitt kvøld. Klokkan 21.22 byrjar showið – hin kongaliga poppímyndin Madonna trínur á pallin úr eini silvurglitrandi diskokúlu – 120 minuttir seinni, kl. 23.22, endar showið**

KONSERTUMMÆLI
*Johan Jacobsen*
*johan@sosialurin.fo*

Tað er næstan – men bara næstan – óhugnaligt at hugsa sær, hvussu væl smurd hendan framførslan var. Madonna er eitt sentrum í poppheiminum, eitt ikon, sum øll, ið hava nakað við hendan heimin at gera hava lagt til merkis. Í august mánaði hevur hon spælt fyri fleiri øðrum evroperarum, ja fleiri – okkurt sum nærkast 1.000.000. Alt hetta er partur av konsertferðini Confessions Tour 2006. Í Evropa er talan um 20 konsertir, sum allar eru útseldar, t. d. heili átta á Wembly Arena í London.

Á veg inn á konsertøkið, gjøgnum gøtur í Horsens, hoyrir ein fleiri ymisk tungumálum, svenskt, týskt, norskt, okkurt eysturevropiskt, arabiskt, danskt og sjálvandi er føroyskt eisini at hoyra millum tey 85'. Seks ungar havnadamur, sum vanliga búgva í Århus hava tikið túrin suður til Horsens.

Og tað var eisini stórt í Horsens. Sjey fótbóltsvøllir skuldu til fyri at leggja grundina undir hetta risastóra konserttiltak. Undan, undir og eftir konsertina vóru 4.500 hjálparfólk í sving. 1.000 2-manstjøld vóru sett upp á Madonna Camp til gestir, sum høvdu brúk fyri at gista. 85.000 upplivdu Madonnu gera tað, sum hon skuldi og tað, sum hon er kend fyri. Og sum tað hóskar eini poppdrotning væl, so kom hon á pallinum úr eini silvurglitrandi diskokúlu, sum varð hivað upp á pallin.

Á pallinum sjálvum hevði dansurin ein stóran leiklut, instrumentini vóru fá og lítið sjónlig. Dansur hevur verið ein megintáttur í framførsluni hjá Madonnu gjøgnum øll árini. Teir flestu sangirnir hava innflættað dansin í tónleikin, soleiðis at dansurin er partur av úttrykkinum og stuðlar einum ávísum huglagi. Eini 15 dansarar vóru í gongd og sjálvandi hon sjálv eisini. Og sjálvt um hon nærkast teimum 50, so vóru tey 48 árini næstan ikki til at síggja aftur. Pallframførslan var týðuliga topp-professionel og imponerandi at síggja, hóast ein stóð einar 300-500 metrar burturfrá. Tríggir stórskíggjar hjálptu til við at varpa tað sum hendi á pallinum út til øll á leikvøllunum í Horsens.

Hetta var eitt konsertupplivilsi av teimum stóru. Men stórt er neyðturviliga ikki tað sama sum gott – einum nýtist ikki at uppliva tað sum gott ella minniligt. Sum eg upplivdi konsertina, so var hon ikki so feit. Heilt einfalt av teirri orsøk, at tónleikurin, sum Madonna hevði valt sær ikki var júst tann, sum eg hevði ynskt mær. Men viðvíkjandi tí logistiska var einki at koma eftir. Poppmaskinan var væl smurd og framførslan var sannførandi. Ongir steðgir ella nakað sum minti um, komu fyri – undirhald í heimsklassa. Løgini streymaðu út í einum jøvnum stima við góðari ljóðgóðsku.

Tað var bæði sannførandi og hugtakandi at hoyra, hvussu løgini viku frá útsetingunum á fløguútgávu. Hetta var galdandi fyri endabrestin, og avgjørt eitt hæddarpunkt á konsertini, »Hung Up«. Lagið Hung Up, hvørs niðurlag er lænt/keypt frá einum kendum ABBA-hitti, riggaði ótrúliga væl við rúm kassagittara-spælið, ið tónaði týðuliga burturúr tí annars ráðandi elektroniska landskapinum. Á kvøldinum vóru nakrar skínandi sangperlur á skránni, men tað var mest sum ov nógv disco yvir tí mesta, soleiðis at tað var meiri enn nokk fyri yvirritaða. Men lagið Drowned World/Substitute for Love, í akkustiskari útseting, var sera væl eydnað og bleiv ein hesa løtuna mintur á ta ótrúligu røddina, sum popp/dansi-drotningin jú eisini livir av.

Presist tveir tímar eftir at tað byrjaði, endaði showið, og meðan tey 85.000 gingu av vøllunum stóð á stórskíggjunum »Have you confessed?«. Fólk virkaðu at vera væl mettaði, eingin stórvegis róp eftir eykaløgum. Beinanvegin var byrjað at taka útgerð, hátalarar og annað niður. Næsta staðið á Confessions-konsertferðini er Paris.

## FAKTA

Um tú var ein av teimum 85 túsund, so hevði tú hoyrt hesi løgini:

1. Future Lovers/I Feel Love.
2. Get Together.
3. Like A Virgin.
4. Jump.
5. Live To Tell.
6. Forbidden Love.
7. Isaac.
8. Sorry.
9. Like It Or Not.
10. I Love New York.
11. Ray Of Light.
12. Let It Will Be.
13. Drowned World/Substitute For Love.
14. Paradise (Not For Me).
15. Music Inferno.
16. Erotica.
17. La Isla Bonita.
18. Lucky Star.
19. Hung Up.